Fylgiskjal 10

Almanna- og Heilsumálaráðið

Hoyringarskriv viðvíkjandi:

”Uppskoti til Løgtingslóg um Leigustuðul.”

Viðmerkjari: **Áhugafelagið ”Lutaíbúðir”.**

1. Inngangur.

Áhugafelagið ”Lutaíbúðir” fegnast um, at gjørligt verður hjá leigarum at søkja um leigustuðul. Tað hevur verið og er ein møguleiki, ið grannalondini hava framt í fleiri áratíggju. Leiguumstøðurnar í Føroyum líkjast umstøðunum aðrastaðni og eru tí eitt kærkomið høvi hjá leigarum, tá ið leigan gerst ein tung fíggjarlig byrða.

2. Viðmerkingar til lógargreinarnar.

Ad § 1.: Her er greitt, hvør hevur rætt til leigustuðul.

Ad § 2.: Somuleiðis greitt.

Ad § 3.: Hetta er ein byrjan, men samanborið við veitingarnar í okkara grannalondum, víkur útrokningarhátturin frá, hvussu upphæddin verður roknað har. Eitt loft, sum her verður skotið upp, eigur at verða endurskoðað og lagað til veruliga tørv umsøkjarans. Tá er tað heldur upphæddin, umsøkjarin hevur til taks eftir útreiðslur, ið hevur týðning.
Kr. 1.500,00, ið sambært lógaruppskotinum er hægsta veitingin, ger altíð mun og kann vera nóg mikið hjá summum, men ov lítið hjá øðrum.

Ad 4.: Sí viðmerking til § 3: Hvat er eftir at liva av, tá ið allar skjalprógvaðar útreiðslur eru goldnar?

Ad 5.: Í Danmørk, ið vit ofta samanbera okkum við, er inntøkugrundarlagið hjá húskinum samlaða skattskylduga inntøkan, mánað fyri mánað. Tað fevnir um løn, bæði A- og B-inntøku og annað, og verður tillagað mánaðarliga, sí t.d. hvussu norðmenn, danir, ella onnur norðurlond rokna inntøkugrundarlagið.

Ad 6.: At upphæddin og inntøkumørkini verða javnað er gott, men báðar upphæddirnar eiga sum viðmerkt omanfyri at endurskoðast og tillagast leigumarknaðinum í landinum í løtuni.

3. Samanumtøka.

Uppskotið til Løgtingslóg um Leigustuðul er avgjørt kærkomið, og yvirhøvur tekur Áhugafelagið "Lutaíbúðir" undir við uppskotinum. Vit eru øll greið um, at mong eru okkara millum, ið stríðast hvønn dag fyri at kunna greiða sínar skyldur.

Samfelagið broytist og er longu nógv broytt. Vit fáa alt fleiri og fleiri stakar uppihaldarar, og krøvini til teirra eru tey somu sum til aðrar samfelagsborgarar, men í mongum førum liggur størri ábyrgd á teimum enn øðrum, har tvey eru til at loysa uppgávuna.

Ein annar týðningarmikil spurningur er, hvussu stóra ogn umsøkjarin eigur. Tann upphæddin er í dag alt ov lág í Føroyum og eigur at enduskoðast alt fyri eitt.

At enda takka vit fyri, at vit eru boðin við og biðin um at viðmerkja lógaruppskotið, ið er eitt stórt og týðningarmikið frambrot innan leigupolitikk Føroya.

Eru spurningar, frætta vit fegin frá tykkum.

Nevndarinnar vegna,
Í Havn t. 09.02.2026,

Hans J, hermansen, formaður.